# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Norsku og svensku meistarnir hava bíðað leingi

**IFK Göteborg hevur bíðað í 11 ár eftir svenska meistaraheitinum. Brann Bergen hevur bíðað í heili 44 ár**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*



*Brann spælarar fegnast eftir eitt av teirra mongu málum*

Í Bergen kunnu tey kenna seg aftur í gleðini hjá NSÍ-viðhaldsfólkunum. Í heili 44 ár máttu tey bíða eftir norska meistaraheitinum. Men tað er ein ótrúlig byrða, sum er fallin av herðunum hjá mongu viðhaldsfólkunum hjá Brann Bergen. Brann hevur flest áskoðarar í Noregi, og hevur besta uppbakkningin í Noregi. Kortini hevur verið ógvuliga soltið við steypum í skápinum hjá Brann.

## Stovnað í 1908

Brann er stovnað 26. september 1908. Hetta merkir so, at Brann kann halda 100 ára haldið, sum norskir meistarar. Og tað ger so ikki gleðina minni. Brann gjørdist norskur meistari fyrstu ferð í 1923, men eisini tá máttu viðhaldsfólkini hjá Brann bíða leingi eftir tí næsta meistaraheitinum. Brann vann meistaraheitið aftur í bæði 1962 og 1963, men eftir hetta komu nógv soltin ár. Onkuntíð hevur glógvað hjá Brann í steypakappingini. Brann gjørdist steypavinnari í 1972, 1976, 1982 og í 2004. Ringast var í árunum 1979-86. Tá flutti Brann upp og niður úr bestu deildini, ár um ár. Í 1980 var Brann í 2. deild. Júst tað árið leikti teir vinardyst ímóti føroyska landsliðnum, sum hevði svenskaran Ronny Gunnarson, sum venjara. Føroyska landsliðið var komið við Smyrli yvir til Bergens. Brann vann tann dystin við 4-3. Kortini glógvaði í Brann í 1996/97. Tá komu teir í fjórðingsfinaluna í UEFA-cup. Í fjórðingsfinaluni taptu teir ímóti Liverpool. Brann fekk 1-1 heima, men tapti 3-0 á Anfield. Men í ár bar so til, og Brann er eisini í UEFA Cup bólkaspælinum.

## Javnaldri hjá KÍ og HB

Svenska stórfelagið IFK Göteborg er javnaldri við HB og KÍ. Felagið er stovnað 4. oktober í 1904. Felagið var upprunaliga tætt knýtt at javnaðarrørsluni, sum altíð hevur verið sterk í Göteborg. T.d. eitur staðið har venjingarstøðin og umsitingarhúsið hjá IFK liggur: "Kamratgården". IFK merkir eisini: "Idrotsföreningen Kameratarna". Longu í 1908 vunnu teir í IFK sítt fyrsta svenska meistaraheitið. Í 1996 vunnu teir sítt 17. meistaraheitið, men so kom stígur í. Og ikki fyrr enn farna sunnudag, tá IFK vann 2-0 á Djurgården á Nya Ullevie leikvøllinum, eydnaðist at fáa 18. meistaraheitið í hús. IFK Göteborg hevur ikki gjørt so nógv um seg í svensku steypakappingini. Teir hava bara vunnið steypakappingina fýra ferðir. Seinast í 1991.

## 2 ferðir UEFA Cup

Bæði í 1982 og í 1987 framdi IFK tað bragd at vinna UEFA Cup kappingina. Í 1982 vunnu teir fyrru finaluna við 1-0 á heimavølli, og 3-0 á Volkspark Stadion í Hamburg. Týskarar, og ikki minst týska pressan vóru skelkaðir! Í 1987 vunnu IFK finaluna ímóti Dundee United úr Skottlandi. Teir vunnu 1-0 heima, og leiktu javnt 1-1 í Dundee. Í 1986 var ógvuliga nær við, at IFK Göteborg kom í Europa Cup finaluna fyri meistaralið. IFK vann fyrru hálvfinaluna ímóti FC Barcelona á Nya Ullevie við einum tryggum 3-0 sigri. Men alt vendi á Camp Nou. Barcelona vann 3-0. Einki mál kom í umdystinum. Í brotssparkkappingini brendu teir í IFK illa, og Barcelona kom í finaluna. Men í finaluni tapti Barcelona ímóti Steua Bukarest aftaná júst brotssparkkapping. Tá brendi Barcelona øll brotssparkini, og taptu teir finaluna 3-0.

IFK var tíðum í Champions League bólkaspælinum í 1990-unum. Í 1995 komu teir í fjórðingsfinaluna, har Bayern Munchen stóð fyri teimum. Men teir taptu eftir 0-0 úti, og 2-2 heima! Nú fer IFK Göteborg kanska at gera um seg í Evropa aftur?


*Áskoðarar í Gøteborg í sigursrómi, eftir at tað var greitt at IFK vórðu kosnir meistarar aftur*